*Lagt til rættis: Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*

## Nordpluss gevur møguleikar:

# Út í heim at læra



Nordplus er eitt samstarv ímillum Norðurlond og baltisku londini, og stuðul kann søkjast um verkætlanir heilt frá barnagarðsbørnum til eftirútbúgvingar

Innan Nordplus samstarvið eru hópin av møguleikum, bæði innan barnaskúlan, hægri útbúgvingar, vaksamannaútbúgvingar og málmenning. Skipanin gevur føroyingum atgongd til umheimin, og til ber eisini at søkja um fíggjarligan stuðul

Aftur í ár ber til at søkja Nordpluss skipanina um pening til verkætlanir, ið hava til endamáls at menna samstarvið ímillum norðurlendsku og baltisku londini í skúla- og undirvísingarhøpi. Og hetta fevnir um alt frá barnagørðum til hægri lestur og til vaksnamannaundirvísing.

Nordplus er býtt upp í fimm skipanir:

- Nordplus junior
  Henda skipanin er ætlað menning á norðurlendskum-baltiskum samstarvi á skúlaøkinum. Skipanin vendir sær bæði til fólkaskúlanæmingar, lærarar, leiðslur og onnur starvsfólk á námsfrøðiliga økinum. Privatskúlar og miðnámsskúlar eru eisini fevndir av junior skipanini.
  Men tað eru ikki ein treyt, at tað skal vera í skúlahøpi. Skipanin røkkur nevniliga heilt niður til barnagarðar, forskúlar og privatskúlar, sum eisini kunnu søkja um stuðul til verkætlanir.

- Nordplus hægri útbúgving
  Henda skipanin er ætlað at menna samstarv og netverk fyri lesandi, lærarar og onnur starvsfólk innan hægri útbúgvingar.

- Nordplus Vaksin
  Sum navnið sigur, snýr henda skipanin seg um læring hjá vaksnum. Henda skipanin er ætlað at menna samstarvið fyri fólksliga upplýsing og undirvísing hjá vaksnum. Hon vendir sær til øll feløg, áhugabólkar, stovnar og skúlar, sum hava við vaksin at gera.

- Nordplus Horisontal
  Hetta er ein tvørgangandi skipan, ið leggur upp til, at stovnar av ymiskum slag arbeiða saman og bróta upp úr nýggjum. Her kunnu tær verkætlanir fáa stuðul, sum fara út um hinar bólkarnar, og sum arbeiða við øðrum, nýggjum og breiðari málum.

- Nordplus Mál og mentan
  Hesin bólkurin vendir sær bert til norðurlendingar. Her ber til hjá flokkum í fólka- og miðnámsskúlanum at søkja um stuðul til m.a. umbýti av flokkum. Eisini fyriskipan av ráðstevnum, skeiðsvirksemi o.a. kann fáa stuðul higani. Endamálið er at menna støðuna hjá norðurlendsku málunum og mentanunum.

Ár um ár skifta evnini, sum stuðul verður latin til. Og evnini eru ikki eins fyri allar bólkarnar. Tó er eitt høvuðsevnið á ovast á breddanum fyri allar bólkarnar í 2009, og tað er veðurlagsbroytingar.

Meiri fæst at vita á:
www.ask.fo
www.nordplusonline.org
www.ciriusonline.dk/nordplus/

### Fakta um Nordpluss

- **Nordpluss er ein skipan hjá Norðurlendska ráðharraráðnum**
- **Skipanin eggjar til samstarv ímillum Norðurlond og baltisku londini**
- **Endamálið er at styrkja norðurlendska-baltiska felagsskapin og samleikan**
- **Øll innan skúlaverkið, umframt stovnar og felagsskapir, ið hava áhuga fyri samstarvi í útbúgvingarmálum, kunnu søkja um pening**
- **Umsóknarfreistin 2009 er 2. mars**
- **Til ber at fáa starvsfólk frá ASK út á skúlar og stovnar at kunna meiri um skipanina**

# Føroyi

Elisabeth Holm, ráðgevi á Altjóða Skrivstovuni, sigur, at føroyingar eru um at lorka sær ein einastandandi møguleika burtur. – LLP skipaninar kundu ment føroyska skúlaverkið og givið okkum holla vitan. Men einki hendir á økinum, staðfestir hon

í 2006 var ein føroysk sendinevnd í Brússel við fyrispurningi um føroyska atgongd til LLP samstarvið, men enn er einki komið burturúr. Sum skilst verður bíðað eftir, at ein granskingaravtala er komin uppá pláss.

Tað merkir, at vit hava meldað pass til eina sera slóðbrótandi og mennandi samstarvsavtalu innan útbúgvingarøkið.

### Ein annar møguleiki

Men hóast vit ikki koma við í samstarvið, so eru einar bakdyr, ið vit kunnu nýta.

Vit kunnu nevniliga gera okkum nakrar praktiskar royndir, til dømis í verkætlanum, eftirútbúgvingarskeiðum fyri lærarar, starvsvenjing og sonevndum "job-shadowing". Eisini kundu vit luttikið í evropeiskum ráðstevnum.

– Men fyri at koma við í LLP-samstarvið, krevst tað, at vit sjálvi rinda kostnaðin, og tí mugu



**Europa skal verða ein vitanardepil, og samstarv skal vera á øllum økjum innan útbúgving. Tað er endamálið við samstarvinum "Lifelong Learning Programme" hjá ES. Øll lond samstarva, men Føroyar eru framvegis uttanfyri, hóast møguligt er hjá okkum at vera við**